# Samgongan missir ein tinglim

**Veljarakanningin, sum Fynd hevur gjørt fyri Sosialin, sýnir, at var val í dag, so misti samgongan ein tinglim. Ein missur, sum tó er til at bera, tá samgongan undan hesum telur 21 mans**

VELJARAKANNING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tjóðveldisflokkurin er vinnarin, og Javnaðarflokkurin er taparin. Tað er greiðasta niðurstøðan, um hugt verður at atkvøðubýtinum millum teir seks flokkarnar á tingi í nýggjastu veljarakanningini, sum Fynd hevur gjørt fyri Sosialin.

Í tingmannatali er tað tó Sjálvstýrisflokkurin, sum hevur størstu orsøkina til fagna, tí sambært kanningini, so tvífaldar flokkurin tingmannatalið. Annars júst um sama mundi, tá onnur kanning metir flokkin at detta undir sperrumarkið fyri tingumboðan. Hartil missur Fólkaflokkurin ein tingmann til Sambandsflokkin, men tann munurin stendst einamest av, at kanningin verður gjørt einvíst út frá samlaða atkvøðubýtinum, og tí ikki tekur atlit til møguliga forfordeiling í einstøku valøkjunum.

*Tjóðveldisflokkurin vinnur mest - og Javnaðarflokkurin missir mest. Tað er í stuttum úrslitið av veljarakanningini, sum FYND hevur gjørt fyri Sosialin*




| | Løgtingsval jan. ´04 | Kanning desember 2006 | Í mun til seinasta val | Tingmannabýti við seinasta val | Tingmannatal í kanning | Broyting í tingmannatali |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fólka-flokkurin | 20,6 | 19,8 | -0,8 | 7 | 6 | -1 |
| Sambands-flokkurin | 23,7 | 23,6 | 0,0 | 7 | 8 | 1 |
| Javnaðar-flokkurin | 21,8 | 19,2 | -2,6 | 7 | 6 | -1 |
| Sjálvstýris-flokkurin | 4,6 | 5,5 | 0,9 | 1 | 2 | 1 |
| Tjóðveldis-flokkurin | 21,7 | 25,8 | 4,1 | 8 | 8 | 0 |
| Miðflokkurin | 5,2 | 6,1 | 0,8 | 2 | 2 | 0 |
| Hin stuttligi flokkurin | 2,4 | 0,0 | -2,4 | 0 | 0 | 0 |
| Tilsamans | 100,0 | 100,0 | | 32 | 32 | |

**Negativ løgmanseffekt**

Hóast ein veljarakanning altíð inniheldur ávísar óvissur og fyrivarni, so skerst ikki burtur, at hendan eigur at geva orsøk til sjálvrannsakan hjá Javnaðarflokkinum. Flokkurin hevur hetta valskeiðið átt løgmann, men hóast tað ofta hevur verið tosað um løgmanseffektina, so tykist hendan at vera negativ í hesum føri.

Ta effektina grundgevur Kristian Magnussen, formaður Javnaðarfloksins á tingi, við, at tað er trupult hjá løgmanni at úttala seg sum formaður fyri Javnaðarflokkin. Hetta skilt soleiðis, at sum løgmaður noyðist Jóannes Ejdesgaard at tosa í bleytari vendingum, har semjusøkjan vigar meira, enn tað annars vildi gjørt.

Somuleiðis helt Kristian, at tað hjá einum flokki, sum hevur djúpar røtur í verkamannafjøldini, altíð vil kosta at sita við ábyrgd í eini samgongu, har felagarnir eru borgarligir flokkar.

**Stór andstøðu-framgongd**

Hóast andstøðuflokkarnir sambært veljarakanningini "bert" vinna ein tinglim, so skerst ikki burtur, at talan er um positivar tendensir hjá teimum trimum. Allir sum ein hava fllokkarnir eina munandi framgongd, og allir sum ein grundgeva teir hetta við, at tað hevur eydnast at verið sjónligir í andstøðuarbeiðinum.

Tað kann í øllum førum staðfestast, at andstøðuarbeiðið hetta valskeiðið hevur verið sera aktivt. Enntá somikið aktivt, at hetta av tingsins røðarapalli hevur verið skírt sum glantrileikur.

# Kostar at verja borg

**Formaður Javnaðarfloksins á tingi heldur, at kanningin sýnir kostnaðin av at sita við ábyrgd. Men hann metir hetta samstundis sum eina áminning til tingmanningina um at markera seg betri**

VELJARAKANNING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tann flokkurin, sum fær einasta veruliga kjaftfiskin sambært veljarakanningini, er Javnaðarflokkurin. Flokkurin gongur 2,6 prosentstig aftur, og missir ein tinglim sambært kanningini.

**Kostar at stýra**

Men hóast hetta í sjálvum sær er lítið hugaligur lesnaður hjá tingmanningini, so tykist formaður floksins á tingið, Kristian Magnussen, ikki at vera skelkaður av úrslitinum.

- Tað ljóðar kanska sum ein slitin kliché, men tað kostar aloftast at sita við ábyrgd og at verja borg. Í samgonguni hava vit hartil sitið saman við tveimum borgarligum flokkum, og tí hava breiðar semjur í fleiri førum verið neyðugar.

- Hartil haldi eg eisini, at tá vit eru flokkurin, sum hevur løgmann, so verður kritikkur av samgonguni ofta identifiseraður við Javnaðarflokkin, og tað er helst ein orsøk til, at vit hava størri afturgongd enn samgongufelagarnir.

Tað hevur støðugt verið tosað um skattalættan. Ikki minst hava arbeiðarafeløgini funnist at javnaðarflokkinum fyri hendan. Kann tað ikki vera ein av orsøkunum til afturgongdina?

- Tað er tað kanska. Hinvegin er tað væl náttúrligt, at skulu verkafeløgini finnast at hesi samgonguni, so verður lagt eftir Javnaðarflokkinum. Men eg haldi nú kortini, at verður tosað um skattalættan, so eigur eisini at vera havt í huga, at samhaldsfasti nú er øktur, so útgjaldið verður uppi á 2.2000 kr. um mánaðin, tá hetta valskeiðið er runnið.

- Tað kann vera, at onkur heldur, at skattalættin var prísurin, sum vit máttu rinda fyri samgonguna, men eg haldi nú kortini, at vit hava fingið nógv annað á skafti. Ikki minst innan almanna- og eldraøkið, har vit jú eisini hava landsstýrismannin.

**Áminning til tingmanningina**

Skal veljarakanningin nýtast sum barometur, so tykist tó ikki, sum hevur veljarin bitið serliga væl merki í avrikini, sum Kristian Magnussen peikar á. Og hóast samgongan væl og virðiliga heldur fast um meirilutan, so ásannar Kristian, at kanningin gevur flokkinum nakað at hugsa um.



- Fyrst og fremst, so eiga vit helst at markera okkum betri. Tað gongur valla dagur, uttan at vit verja borg mótvegis veljarafjøld okkara, men vit rópa kanska ikki so hart um tað. Tá er tað munin lættari at sita í andstøðu, har tú altíð kanst peika á ymsar lutir, uttan at tað kostar nakað sum helst.

- Og so hava vit eisini tann "trupulleika", at formaðurin hjá okkum er løgmaður. Tað ber við sær, at hann í stóran mun noyðist at tosa breitt og semjusøkjandi um mál, har aðrir formenn hava munandi leysari teymar.

Men gevur tað ikki eisini tingmanningini størri ábyrgd at tosa søk floksins?

- Tað er avgjørt ein áminning til okkum um, at vit mugu markera okkum betri. Vit skulu heilt avgjørt vera dugnaligari til at vísa á okkara arbeiði at verja borg og at menna vælferðina í samfelagnum.